Steffan Klein Poulsen
Jenis av Rana
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin)
(Frádráttur fyri samsýning fyri hjálpararbeiði við kirkjuligum, manngóðum ella alment gagnligum endamáli)

§ 1

Í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin), sbrt. løgtingslógarkunngerð nr. 109 frá 19. september 2023, sum broytt við løgtingslóg nr. 163 frá 20. desember 2023, verður í § 29 b, stk. 1 aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:

"Sama er galdandi fyri samsýning til persón fyri hjálpararbeiði við kirkjuligum, manngóðum ella alment gagnligum endamáli."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2025.

Almennar viðmerkingar
Vit føroyingar munnu vera millum hepnastu fólk í heiminum. Fødd í einum av heimsins tryggastu og ríkastu umhvørvum, har møguleikarnir fyri menning, útbúgving, at velja sær starv, stovna familju og at virka munnu vera av teimum fremstu.

Umframt øll tey mongu skipaðu almennu tilboðini, sum fylgja lívsleiðini, hava vit tey mongu, menn og kvinnur, sum sjálvboðin taka saman hendur og veita hjálp og stuðul á ymiskum økjum. Umframt ítróttina hava vit kirkjulig, samkomulig og mong onnur manngóð ella alment gagnlig øki og átøk, har arbeiði, sum er gull vert, dag og dagliga verður lagt úr hondum. Hesi eru fyrimyndir við bæði tíð og orku at stuðla undir og byggja m.a. lívsgrundarlag komandi ættarliðsins.

Longu í 2006 varð partur av hesum sjálvbodna arbeiði, tað ítróttarliga, so mikið virðismett av tí almenna, at skattalógin varð broytt. Broytt soleiðis, at m.a. dómarar, linjuverjar, umframt venjarar innan ítróttina og leiðarar og hjálparar hjá ítróttafeløgum, fingu skattafrælsi til samsýning, um hendan ikki fór upp um kr. 15.000 árliga. Hendan upphæddin er síðani javnt hækkað til nú at vera kr. 50.000.

Hetta uppskotið hevur sum endamál skattliga at javnseta virksemi á kirkjuligum, samkomuligum og øðrum manngóðum ella alment gagnligum økjum, við virksemi teirra, sum virka innan ítróttina. Sum dømi um manngóðar ella alment gagnligar felagsskapir, hvørs leiðarar og hjálparfólk kundu fingið styrk av at verða javnsettir teimum ítróttarligu, kunnu nevnast skótafelagsskapir, Reyði Krossur, umhvørvisfelagsskapir, sjúklingafeløg, djóraverndarfelagsskapir, mentanarverjandi felagsskapir og talvfeløg.

Talan verður um skattafrítøku fyri samsýningar, sum verða útgoldnar upp til ásettu upphæddina. Fer samsýningin upp um hesa, verður øll samsýningin skattskyldug, tá samsýningin í teimum førum meira er at meta sum vinna.

Uppskotið hevur ikki verið til ummælis, og eru tí ongar viðmerkingar til tað.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Trupult er at meta um nettoútreiðslurnar av uppskotinum, tí ilt er frammanundan at meta um, hvussu stór nýtslan av møguleikanum, lógarbroytingin gevur, verður.

Gagnligu ávirkanirnar og fylgjurnar kunnu sum frálíður hugsast at taka yvir, tó at vit við byrjan fara at uppliva ein avmarkaðan fíggingartørv, sum verður fíggjaður á komandi fíggjarlógum.

Lógaruppskotið fer at hava ávísar umsitingarligar avleiðingar fyri bæði land og kommunur, sum ilt er at meta støddina á, tí ómøguligt er frammanundan at siga, hvussu stór nýtslan av møguleikanum verður.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Greinin verður broytt soleiðis, at persónur, sum fær samsýning, ið stavar frá hjálpararbeiði við kirkjuligum, manngóðum ella alment gagnligum endamáli, fær somu rættindi til skattafrítøku sum dómarar, linjuverjar, umframt venjarar innan ítróttina, og leiðarar, hjálparar hjá ítróttafeløgum, um hendan samsýning ikki fer upp um kr. 50.000 um árið.

Til § 2
Áseting um gildiskomu.

Á Løgtingi, 7. mars 2024

Jenis av Rana Steffan Klein Poulsen